LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 18. februar 2025
J. nr.: 25/04123-2

Svar

upp á

skriftligan fyrispurning nr. 52-081/2024 eftir § 52a í Tingskipanini um tilbúgving í føroysku tunlunum

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingkvinna

Svarari: Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Tilbúgving í føroysku tunlunum

Spurningar:

1. Hvussu metir landsstýrismaðurin um støðuna viðvíkjandi tilbúgving í teimum føroysku tunlunum?
2. Er landsstýrismaðurin sinnaður at arbeiða fyri einum samlaðum tilbúgvingarleisti fyri allar tunlar og undirsjóvartunlar í Føroyum?

Svar til spurning nr. 1
Tilbúgvingin í tunlunum í Føroyum hevur tikið støði í teimum normum, sum fakliga vóru ráðandi, tá tunlarnir vórðu bygdir, og sum heild meti eg, at hetta hevur verið gjørt á nøktandi hátt.

Tó eru krøvini til tilbúgving í tunlum munandi økt gjøgnum árini, og nógvir tunlar eru tískil ikki dagførdir samsvarandi. Umframt hetta hava vit eisini sæð dømi um, at tilbúgvingarskipanir hava verið óvirknar - í onkrum føri í longri tíð. Hetta haldi eg ikki er nøktandi.

Økt ferðsla, elbilar, langir tunlar og vandamikil ferðsla seta eisini størri krøv í dag, enn tá tunlarnir vórðu bygdir.

Svar til spurning nr. 2

§ 18 í tilbúgvingarlógini ásetur greitt, at allir partar í tilbúgvingini hava skyldu at samstarva. Tað er tí leiðslan í tunnilsfeløgunum, tá tunlar eru skipaðir í partafelag, landið, tá talan er um landsvegatunlar, og kommunurnar, tá talan er um kommunalar tunlar, ið hava ábyrgdina av at reka og fíggja eina nøktandi tilbúgving á egnum øki.

Partarnir hava harafturat ábyrgd av at samstarva við kommunur og við lands- og ríkismyndugleikar og at gera tilbúgvingarætlanir fyri at tryggja, at tilbúgvingin í tunlunum er nøktandi og kann fremjast í verki.

Landsstýrismaðurin í tilbúgvingarmálum samskipar tilrættisleggingina av tilbúgvingini og skal á tann hátt tryggja eina samvirkandi tilbúgving fyri alt landið og veitir myndugleikum, kommunum og fyritøkum ráðgeving.

Eg havi tískil vegleitt partarnir um omanfyrinevnda ábyrgdarbýti og eggjað til samstarv, so tunlarnir eru í nøktandi standi, tá ferðsluóhapp henda í tunlunum. Tað eru sostatt omanfyri nevndu partarnir, sum hava fremstu ábyrgdina av at arbeiða fyri einum samlaðum tilbúgvingarleisti fyri allar tunlar og undirsjóvartunlar í Føroyum.

Løgmálaráðið 18. februar 2025

Bjarni K. Petersenlandsstýrismaður